## Nýggjárshald í Runavík

Nýggjársnevndin í Runavíkar Kommunu skipar aftur í ár fyri felags nýggjárshaldi fyri í búgvunum í kommununi. Byrjað verður kl. 23.15 við kyndlagongu frá Rókini og frá Glyvra skúla oman á nýggja havnarøkið. Nýggjársrøðan verður hildin kl 23.45, har røðarin verður Jákup Lamhauge, fyrrverandi borgastjóri í kommununi. Á middnátt verður stóra bálið tendrað og skotið verður við fýrverki. Harumframt verður skipað fyri felagssangi. Klokkan 01.00 verður nýggjársdansur í Støkkhøllini við Ronnie Nielsen, Hjalta Joensen, Høgna Klakkstein og Jákupi Olsen.



## Hótti pedagog

Ein pedagogur í Esbjerg í Danmark hevur lært, at ein skal vera varin við at leggja seg út í ósemjur millum ung. Pedagogurin, sum er maður, kom fram á tríggjar 14, 15, og 17 ára gamlar gentur, sum vóru vorðnar ósamdar við tveir dreingir, sum vóru 15 og 17 ár. Alt í einum lupu tey fimm á hvør annan. Pedagogurin legði uppí og royndi at skilja tey sundur, men gavst, tá tann 15 ára gamli drongurin hótti hann við lívinum. Málið er latið løgregluni.




*- Tað kann ikki vera rætt, at eitt nú línumenn skulu noyðast at vera við hvønn túr fyri at fáa eina líkinda inntøku, tá ið árið er úti, heldur Jan Højgaard, formaður í Føroya Fiskimannafelag*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Fiskimenn gjalda nógv fyri reiðarar

**– Neyðugt er við nýhugsan innan okkara fiskivinnu, soleiðis at menn ikki eru burtur ein so stóran part av árinum, heldur Jan Højgaard, formaður í Føroya Fiskimannafelag**



*Føroyski fiskiskipaflotin, sum er í havn, liggur. Tey skip, sum eru úti, verða løgd so hvørt, tey koma til lands*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

SÁTTMÁLASTRÍÐ

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Føroya Fiskimannafelag hevur lýst verkfall fyri limir felagsins, eftir at samráðingarnar við Føroya Reiðarafelag um nýggjan sáttmála slitnaðu seinnapartin í gjár. So langt var millum partarnar, at semingsmenninir als ikki dittaðu sær at leggja framnakaðsemingsuppskot, hóast partarnir í hesum umfari høvdu sitið við samráðingarborðið í tvey samdøgur – ikki út í eitt, men kortini í nógvar tímar tilsamans.

Semingsmaðurin, Terji Sigurðsson, staðfesti í gjár, at feløgini ikki vóru sinnaði at flyta seg í trætuni, sum serliga hevur snúð seg um eftirløn og luttøku í oljuútreiðslum.

### Einki hoyrt

Formaðurin í Føroya Fiskimannafelag, Jan Højgaard, sigur, at síðan samráðingarnar slitnaðu í gjár, og felagið lýst verkfall, hevur hann einki hoyrt frá semingsmonnunum, ei heldur frá Føroya Reiðarafelag.

– Eg dugi ikki at siga, um hetta verður eitt drúgt verkfall – ella, um vit onkusvegna kunnu finna eina semju komandi dagarnar.

Spurdur, um stjórnin í Føroya Fiskimannafelag kennir seg at hava fiskimenn aftan fyri seg í hesum sáttmálastríði, sigur Jan, at hann hevur fingið nógvar reaktiónir frá fiskimonnum, síðan felagið lýsti verkfall fyri limir sínar.

- Allar hesar reaktiónir hava verið positivar, og eg kenni á mær, at vit hava fullan uppbakning millum okkara limir. Hinvegin dylja menn ikki, at teir vilja sleppa avstað aftur, tá ið tíðin gongur, og øll vóna, at ósemjan ikki gerst ov drúgv.

### Tjena nógv meira

Jan Højgaard heldur fast um, at fiskimenn longu nú gjalda nóg nógv fyri reiðararnar, sum hann tekur til.

- Okkara limir taka lut í so nógvum útreiðslum, og eg haldi ikki, at vit í uppaftur størri mun kunnu taka lut í hesum útreiðslum hjá reiðarunum.

Formaðurin í Føroya Fiskimannafelag hevur í fjølmiðlunum víst á, at føroyskir fiskimenn eru rýmdir til Noregs at siga, tí umstøðurnar har eru so nógv betri enn í Føroyum.

Á blaðsíðu 14 í Sosialinum í dag sigur formaðurin í Føroya Reiðarafelag, Viberg Sørensen, at Jan er vælkomin at skjóta upp, at sáttmálin hjá norskum fiskimonnum verður settur í gildi fyri føroyskar fiskimenn.

Er tað ein slíkan sáttmála, sum Føroya Fiskimannafelag vil hava fyri føroyskar fiskimenn, spurdu vit formanninum í Føroya Fiskimannafelag.

- Tað er ikki hetta, vit vilja siga, men vit ásanna, at føroyskir fiskimenn, sum sigla í Noregi, tjena nógva meira enn fiskimenn, sum sigla við føroyskum skipum. Haraftrat hava teir ein nógv størri frádrátt í skattinum.

### Neyðug nýhugsan

Jan Højgaard heldur, at neyðugt eisini er við nýhugsan í føroyskari fiskiskipavinnu, soleiðis at menn kunnu vera meira heima.

- Tað kann ikki vera rætt, at eitt nú línumenn skulu noyðast at vera við hvønn túr fyri at fáa eina líkinda inntøku, tá ið árið er úti. Hesir menn tjena so lítið, at teir hava ikki ráð til eina skiftiskipan, og tað kann ikki vera rætt, sigur formaðurin í Føroya Fiskimannafelag.

## Wissey boringin byrjar

**Faroe Petroleum boðar frá, at leygardagin tann 15. desember byrjaði boripallurin Labrador at bora Wissey brunnin, har Faroe Petroleum luttekur við 18,75%.**



*Nils Sørensen*

Tað er oljufelagið Tullow Oil UK Limited, sum er fyristøðufelag, og væntandi tekur tað 37 dagar at bora niður á gasskelduna.

Wissey gasskeldan er á bretskum øki á blokkinum 53/4D, og liggur keldan 10 km eystanfyri framleiðsluеindina Horne og Wren, sum Tullow Oil eisini er fyristøðufelag fyri. Gassið frá Wissey verður flutt til hesa framleiðsluеindina.

Fyrsta gassið úr Wissey kemur væntandi í seinni hálvu av 2008. Parturin hjá Faroe Petroleum svarar til 1800 tunnur um dagin umroknað til olju. Samlaði parturin hjá Faroe Petroleum verður mettur til í minsta lagi 1 mió. tunnur av olju umroknað frá gassi.

Faroe Petroleum hevur longu gassframleiðslu frá Minke gasskelduni, og harumframt boðaði felagið nýliga frá, at tað hevði keypt seg inn á tvær aðrar gasskeldur, nevnliga Schooner, sum er í framleiðslu, og Topaz, sum væntandi verður borað og útbygt til framleiðslu seinni í 2008. Wissey er ein týðandi liður í framtíðarætlanini hjá felagnum, um at økja um inntøkur frá olju- og gassframleiðslu.

Faroe Petroleum kunngjørdi eisini herfyri, at ætlanin er at luttaka í 26 brunnum tey komandi 2 árini, og í løtuni luttekur felagið í William brunninum, sum verður boraður á føroyskum øki, og Wissey brunninum á bretskum øki.